
Blái Krossur hevði landsstevnu um vikuskiftið

# Landsstevnan hjá Bláa Krossi

**Um vikuskiftinum hevði Blái Krossur landsstevnu í Miðvági. Millum annað var føroyskur rúsdrekkapolitikkur á skránni, har umboð fyri landsins myndugleikar eisini vóru við**

Landsstevnan byrjaði við aðalfundi. Á skránni vóru framløgur og nevndarval. Nevndarlimirnir, sum stóðu fyri vali, tóku við afturvali. Nevndin skipaði seg við Sverra Steinhólm, presti, sum formanni, og Álvi Højgaard sum næstformanni. Hinir nevndarlimirnir eru: Óluva Sunnsker, Tórshavn, Alis Højsted, Funningur, Regin Jacobsen, Nes, Jóna Thomsen, Toftir og Jóhan Eliassen, Fuglafjørður.

Formaðurin greiddi frá, at fíggjarkreppan hevur tarnað byggingini av nýggja Blákrossheiminum í Eysturoynni, men at ætlanirnar ikki eru sleptar. Eisini umsorganarheimið hevur merkt sviðan av fíggjarkreppuni, og á umsorganarøkinum eru eisini skerjingar gjørdar, m.a. á Kafé Blákross.

Fíggjarliga úrslitið hjá Bláa Krossi í 2008 var eitt avlop á kr. 15.000 í mun til eitt hall á 195.000 í 2007.

## Pallborð

Aftaná døgverða fyltist missiónshúsið í Miðvági til pallborðstiltakið, har evnið var føroyskur rúsdrekkapolitikkur. Við pallborðið sótu Pál Weihe, formaður í Fólkaheilsuráðnum, Jóhan Dahl, landsstýrismaður, Jákup Mikkelsen, formaður í Løgtingsins Trivnaðarnevnd, Hjalmar Hansen, aðalskrivari hjá Bláa Krossi og Gunnar Nattestad, sum umboðaði vanliga borgaran.

Luttakararnir vóru samdir um, at rúsdrekka burdi verið eitt heilsumál og ikki eitt vinnumál, sum tað er í dag. Eisini hildu teir, at inntøkurnar, sum koma inn frá rúsdrekka, skuldu farið til viðgerð av teimum trupulleikum, sum standast av rúsmisnýtslu.

Eisini var semja um, at tað skuldi verið meira peningur avsettur til fyribyrging og kunning.

Pál Weihe legði fyri. Hann greiddi frá við hagtølum um nýtsluna í Føroyum í dag samanborið við fyrr og samanborið við útlond. Nýtlsan í Føroyum liggur beint omanfyri 7 litur av alkoholi pr íbúgva eldri enn 15 ár. Seinastu árini er hetta talið vaksið støðugt. Hetta talið helt Pál vera í hægra lagi, og gott hevði verið at fingið tað niður um 7 aftur.

Jóhan Dahl helt, at øll søla av rúsdrekka skuldi farið ígjøgnum rúsdrekkasøluna, og sotatt skuldi tað ikki verið loyvt bryggjaríunum at selt øl til privatpersónar. Orsøkin til hetta er, at tá er øll sølan undir skipaðum viðurskiftum. Eisini kom hann við einum uppskoti um at gera eitt rúsdrekka ár, eftir sama leisti, sum tað í ár er eitt heilsu ár. Har skal so dentur verður lagdur á vandan við rúsdrekka, og tiltøk setast í verk fyri at tálma nýtsluni.

Jákup Mikkelsen helt ikki, at tað var nóg gott mál, at nýtslan ikki skuldi vaksa. Hann helt, at málið


*Sverri Steinhólm, prestur, er formaður í Bláa Krossi*

mátti vera, at nýtslan minkar. Eisini helt hann, at tað var av týdningi, at aldurin, tá børn byrja at drekka, mátti hækka. Tað, sum vit hava sæð seinastu árini, er, at børn gerast yngri og yngri tá tey byrja. Hetta er eitt keðiligt rák. Vit eiga at tryggja børnum ein rúsfrían barndóm.

Eisini helt Jákup, at vit eiga at hava betri eftirlit við innflutningi av rúsdrekka.

Gunnar Nattestad setti spurningin, 'um vit ikki høvdu rúsdrekka, var tað so ein vøra, sum vit vildu ynskt okkum?' Hetta nýtti hann fyri at seta málið í perspektiv. Høvdu vit ynskt okkum tær avleiðingar, rúsdrekka gevur, um tær ikki vóru til staðar. Rúsdrekka kostar samfelagnum nógvar pengar hvørt ár, og tað kostar teimum, sum gerast offur fyri tí, nógv meir enn pengar. Helst hevði rúsdrekka verið ólógligt, um tað kom fram í dag.

Hjalmar Hansen gjørdi viðmerkingar til skeinkiloyvini. Summi av skeinkiloyvunum eru ikki serliga væl umhugsað. M.a. eigur at verða hugt eftir, hvar hesi eru, í mun til hvussu sjónlig tey eru í býar/bygdarmyndini. Tey eiga t.d. ikki at liggja har, sum børn og ung vanliga ferðast. Hjalmar vísti eisini á, at í miðal drekkur hvør føroyingur yvir 15 ár 12,5 kassar av gulløli um árið. Nýtslan er vaksandi og ikki støðug, sum annars ofta verður sagt, og tí má eitt avgjørt mál vera at fáa nýtsluna at minka.

Allir luttakararnir við pallborðið vóru samdir um, at hugburður var tað týdningarmesta. Tað er ov lítið at Blákrossfólk hava hugburðin – øll mugu hava ein fyribyrgjandi hugburð. Foreldur, myndugleikar og politiska skipanin eiga at vera fyrimyndirnar!

## Kvøldseta og ungdómstiltak

Landsstevnan helt fram við eini kvøldsetu leygarkvøldið. Gimme Olsen røddi og hugleiddi um evnið 'Hevur Gud umsorgan fyri mær', har hann dvøldi við spurningin 'Hvar er Gud, tá eg havi tað ringt'. Gimme greiddi sera hugtakandi frá sínum egna lívi, um teir trupulleikar hann hevði havt sum barn, og um hvussu hann hevði lært, at eisini í truplum tíðum var Gud at finna. Trupulleikin er ofta tann, at vit leita eftir Gudi við liðina á okkum, tí vit vænta, at hann fylgist við okkum. Tá vit hava tað ringast, er hann ikki við liðina á okkum, men hann ber okkum. Hetta síggja vit sum oftast ikki fyrr enn aftaná.

Um kvøldið var eitt ungdómstiltak á skránni, har Jan Højgaard greiddi frá um lív sítt. Hann byrjaði at drekka á ungum árum. Á einum møti fyri nøkrum árum síðan kom hann til trúgv á Jesus, og hetta hjálpti honum at leggja av at drekka.

## Sunnudagurin

Sunnudagurin á landsstevnuni byrjaði við gudstænastu við Sverra Steinhólm, formanni í Bláa Krossi. Seinnapartin var eitt familjutiltak í Miðvágs kirkju, har barnakórið í Sørvági sang, ein dramabólkur úr Miðvági framførdi, og Petur F. Johannesen fortaldi um kongin, sum kom ríðandi á einum asna pálmasunnudag. Kirkjan í Miðvági var fullsett til hetta tiltakið.

Landsstevnan endaði við einum Blákrossmøti, har Petra Gregersen talaði um víntræðið og greinarnar og um Guds kærleika. Tórhild Bjarkhamar sang á hesum tiltakinum.